FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Finance

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Tórshavn, 19. mars 2021
J. nr.: 21/00116
Viðgjørt: BAB

Svar upp á fyrispurning nr. 52-086/2020 frá Sirið Stenberg, løgtingsmanni, settur Jørgeni Niclasen, landsstýrismanni í fíggjarmálum, um Atlantsflog

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Hevur Atlantsflog borið so í bandi, at uppsøgdu starvsfólkini í felagnum hava havt møguleika at fingið endurnýggjað tey ymisku loyvi, skjøl o.a., sum eru neyðug fyri at varðveita teir førleikar, sum skulu til fyri at røkja størvini?

2. Um ja, hvussu nógv fólk er talan um?

3. Um nei, hevur Atlantsflog nakrar ætlanir um at lata uppsøgdu starvsfólkini fáa møguleika at endurnýggja skeið, skjøl og annað neyðugt fyri starvið?

4. Nú flogferðslan væntandi tekur seg upp aftur, er ætlanin so at seta nøkur av størvunum aftur?

Svar:

Síðani okkara tjóðarflogfelag byrjaði sítt virksemi, hevur stórur dentur verið lagdur á, at útbúgva føroyingar at átaka sær eina rød av størvum innan flogvinnu. Atlantsflog hevur útlært fleiri hundrað fólk sum flogmekanikarar, flogskiparar, flogternur og hópin av øðrum størvum innan flogvinnuna, ið strembanini eftir at menna førleikar í Føroyum innan vinnuna.

Flog- og ferðavinnan er sera hart rakt av COVID-19 farsóttini. Inntøkugrundarlagið er nógv minkað síðsta árið og tíverri hevur tað verið neyðugt at senda flest øll starvsfólk í serskipanina hjá ALS í mars í fjør, og seinni at uppsiga umleið 100 starvsfólk í mai 2020. Hetta harmast vit øll um.

Atlantsflog hevur upplýst at uppsagnartilgongdin varð eftir skipaðum leisti og uppsøgdu starvsfólkini vóru fríttstillað í uppsagnartíðini og avgjørt varð, ikki at mótrokna møguliga løn frá øðrum arbeiðsgevara í uppsagnartíðini.

Felagið hevur øll árini rindað fyri viðkomandi útbúgving og neyðug skeið og loyvir til allar starvsbólkar í felagnum, íroknað pilotar og mekanikarar.

Atlantsflog upplýsir eisini, at tá ið starvsfólk verða sett aftur í starv, tryggjar felagið, og somuleiðis rindar fyri, at viðkomandi starvsfólk fáa allar neyðugar dagføringar, útbúgvingar, skeið, loyvi og

simulatorvenjingar. Atlantsflog hevur upplýst, at dagføringarnar kosta leysliga mett 70.000 kr. árliga fyri pilotar og 15.000 kr. fyri mekanikarar

Flogferðslan til og úr Føroyum er framvegis sera hart rakt av Covid-19 farsóttini og avmarkingum og tilmælum, ið sett eru í verk fyri at minka um smittuvanda. Orsakað av m.a. kravi um seks daga heimauppihald er flogferðslan í løtuni munandi minni enn síðsta heyst og óvissan um, nær herdu ferðatilmælini verða broytt, rakar flogvinnuna og ferðavinnuna sera hart. Óvist er tí, nær felagið fær tørv á fleiri starvsfólkum. Men tá ið starvsfólk verða sett aftur í starv, tryggjar felagið, og somuleiðis rindar fyri, at viðkomandi starvsfólk fáa allar neyðugar dagføringar, útbúgvingar, skeið, loyvi og simulatorvenjingar.

Tinganes, 19. mars 2021

Jørgen Niclasen
landsstýrismaður í fíggjarmálum